Kappingarráðið

# Fulltrúar til skrivstovuna hjá Kappingarráðnum

Skrivstovan hjá Kappingarráðnum søkir við hesum eftir tveimum fulltrúum. Vit kundu hugsað okkum, at røttu umsøkjarar hava útbúgving innan løgfrøði og búskaparfrøði ella hava aðra samfelagsfrøðiliga útbúgving. Einhvør við útbúgving frá hægri læristovni er annars vælkomin at søkja størvini.

Uppgávan hjá Kappingarráðnum er at umsita løgtingslóg nr. 83 frá 6. juni 1997 um kapping og frá 1. januar 2008 nýggju kappingarlógina, løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007. Lógin hevur til endamáls, við virknari kapping, at fremja eina fulldygga samfelagsliga tilfeingisnýtslu til gagns fyri fyritøkur og brúkarar.

Við nýggju kappingarlógini fær føroyskt vinnulív somu karmar sum vinnan í grannalondunum. Hetta merkir, at fyrsta uppgávan hjá nýggju fulltrúunum verður at fyrireika vinnuna til hesar stóru broytingar.

Kappingarráðið er fyrisitingarliga skipað saman við Skráseting Føroya, Post- & Fjarskiftiseftirlitinum og Tryggingareftirlitinum.

## Størvini

Innihaldið í størvunum fevnir í høvuðsheitum um:

- at fyrireika mál til Kappingarráðið
- at gera kanningar um kappingarviðurskifti
- at menna eftirlitsvirksemi
- at skriva frágreiðingar og vegleiðingar
- at tilevna reglugerðir og mannagongdir
- at menna førleikarnar á kappingarlógarøkinum

Líknandi uppgávur kunnu eisini verða at loysa fyri Skráseting Føroya, Post- & Fjarskiftiseftirlitið og Tryggingareftirlitið

## Førleikar

Vit vænta, at tú hevur:

- viðkomandi samfelagsvísindaliga útbúgving frá hægri lærustovni ella aðra útbúgving frá hægri lærustovni.
- góð analýtisk evni
- royndir innan privata ella almenna fyrisiting

Umsøkjarar skulu vera førir fyri at arbeiða sjálvstøðugt, hava góð samstarvsevni og hegni at arbeiða undir trýsti.

Skrivstovan hjá Kappingarráðnum bjóðar eitt sera fjøltáttað og sjálvstøðugt starv við avbjóðandi uppgávum, sum eru persónliga og yrkisliga mennandi, umframt møguleika fyri samstarvi og samskifti við norðurlendskar kappingarmyndugleikar og aðrar myndugleikar í Føroyum. Vit kunnu bjóða góðar skeiðs- og eftirútbúgvingarmøguleikar, og luttøku á norðurlendskum og altjóða ráðstevnum innan kappingarlógarøkið.

## Setanartreytir

Setanartreytir verða eftir galdandi sáttmála við BLF ella annað avvarðandi fakfelag. Setanin fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí umframt løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Umsóknir, saman við prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast til:

Kappingarráðið
Skálatrøð 20
Postboks 73
FO-110 Tórshavn

og vera stovninum í hendi í seinasta lagi tann 18. november 2007.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Terja Sigurðsson, deildarleiðara, á tlf. 35 60 41 og t-post: terjes@kapping.fo ella Jógvan Thomsen, stjóra, á tlf. 35 60 21 og t-post: jt@kapping.fo.

Skálatrøð 20 · Postboks 73 · F0-110 Tórshavn · Føroyar · Tel + (298) 35 60 40 · Fax + (298) 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

---

Maskinistur | Maskinmeistari | Skipari | Skipsførari

# Spennandi útbúgvingar

## - eitt hav av vinnumøguleikum

**Nýtt skúlaár byrjar 3. januar 2008. Umsóknarfreistin er 3. des. 2007.**



### Maskinmeistari

Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta og hægsta tekniska yrkisútbúgving, sum kann takast í Føroyum. Útbúgvingin gevur sera stórar møguleikar, bæði á sjógvi og landi, líkamikið um tað er í Føroyum ella úti í heimi. Maskinmeistaraútbúgvingin gevur eisini møguleikar fyri at blíva elinnleggjari. Eisini í oljuvinnuni eru maskinmeistarar størsti einstaki yrkisbólkurin. Útbúgvingin tekur 3 ár.

Upptøka til maskinmeistaraútbúgvingina er tvær ferðir um árið; byrjar aftur í januar 2008.

### Maskinistur

Maskinistútbúgvingin gevur møguleikar fyri at vera maskinstjóri á flestu veiðuførum, sum fiska á føroyskum sjóøki. Útbúgvingin gevur t.d. eisini rætt til at vera maskinstjóri á skipum við maskinorku upp til 3000 kW í altjóða sigling. Útbúgvingin tekur 9 mánaðir.

Upptøka til maskinistútbúgvingina er eina ferð um árið og byrjar aftur í august 2008.

### Skipari

Vinnuháskúlin bjóðar altjóða góðkendar útbúgvingar til skipara og skipsførara, sum geva vinnumøguleikar á sjógvi og landi um allan heim. Sum skipari kanst tú føra øll fiskiskip um allan heim, eins og farmaskip, upp til 3.000 tons.

Skiparaútbúgvingin tekur hálvtannað ár. Tá ið tú hevur staðið skipara, kanst tú fara beinleiðis til skipsførara.

### Skipsførari

Skipsføraraútbúgvingin tekur tilsamans 3 ár; 3 hálvár til skipara og síðani 3 hálvár til skipsførara. Sum skipsførari kanst tú føra øll skip á øllum høvum.

Upptøka til skipara- og skipsføraraútbúgvingarnar er tvær ferðir um árið og byrjar aftur í januar 2008.

Maskinist- og maskinmeistara-, skipara og skipsføraraútbúgvingarnar eru moduluppbygdar.

Hevur tú hug at gerast maskinistur, maskinmeistari, skipari ella skipsførari? Set teg so í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um upptøkutreytir og lesturin saman við umsóknarblaði.

Umsóknirnar skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 3. desember 2007. Umsóknarblað kann eisini heintast á heimasíðu okkara: www.vh.fo

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Postboks 104 · FO-110 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · vh@vh.fo · www.vh.fo

KREA